

*Calderterrassan framman fyri matstovuni við útsýni yvir Oyrasund.*
*Louisiana Museum of Modern Art*

# HER FINNA VIT STÓRBÆRT RÍKIDØMI

LEGG LEIÐINA FRAMVIÐ **LISTASAVNINUM LOUSIANA** NÆSTU FERÐ TÚ FERT **NIÐUR** EIN **TÚR**. TÚ VERÐUR HEILT VIST **VÍSARI** INNAN, VAKRARI UTTAN OG **RÍKARI** SUM HEILD..



**MENTAN**
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Við víðopnum sinni og kenslunæmum sansum liggi eg fjálg og trygg í døkkum, reyðum skyni. Kring meg skvatlar ein flógvur bjálvi varliga aftur og fram saman við ljóðinum frá rútmiskum hjartaslátturi og tungum andadrátti.

Hóast eg eri sjey ára gomul, eri eg eitt fostur í móðurlívi.

Fyri løtu síðani kreyp eg niður í stóru barnakonuna á gólvinum. Onkur lyfti lokið av búkinum og vísti mær inn í opið, har til ber at kenna, hvussu tað er at liggja í búkinum hjá mammu síni aftur.

Uttan fyri barnakonuna stendur ein persónbilur parkeraður á flísagólvinum. Hann er klæddur við grønum flagi. Í øllum krókunum eru alskyns aðrir løgnir lutir og listaverk, sum vit børn kunnu royna, nerta við, kenna og práta um.

Eisini í vakra garðinum við víða havútsýninum eru gávur til sansirnar. Til dømis ein risastórur og ikki sørt vandamikil skreiðibani og ein garvillur rennistrongur tvørtur um eitt grønt vatn, har summi detta útí.

Vit eru stødd í seinnu helvt av sjeytiárunum. Modernaða listasavnið Lousiana í Humlebæk í Norðursælandi hevur, í rætta tíðarandanum, eina framsýning við heitinum "Børn er et folk".

Seinni havi eg skilt, at fólk í hópatali tustu til framsýningina, sum eisini gjørdist eitt satt frambrot innan norðurlendska barnamentan.

## Festir seg í hugan

Hetta er mítt fyrsta minni frá Lousiana. Ein stekt uppliving, sum festi seg í unga barnasinnið, og sum hevur fylgt mær síðani. Eins og aðrar sterkar upplivingar, sum hava lyndi til at meiðsla seg í minnið.

Hetta vita tey á listasavninum Lousiana. Stóra víðagitna modernaða listasavninum, sum er millum tey